# Døgnland Calcium, Phosphor og Magnesium

Brúkast skal 2.5 l dunkur, sum inniheldur 20 ml Saltsýru 6M. Hesin fæst á Rannsóknarstovuni.

1. Lat vatnið t.d. kl.8 á morgni og koyr tað burtur
2. Samla síðan alt vatnið í dunkin til og við næsta morgun kl.8

Skriva klokkutíð bæði tá byrjað og endað verður á bíleggingarseðilin. Fer okkurt til spillis er neyðugt at samla av nýggjum.
Meðan samlað verður, skal dunkurin helst goymast kalt. Lat ikki vatnið beinleiðis í dunkin, tí sýra er í dunkinum.

Set strikukotu frá bíleggingarseðlinum á dunkin
Avlevera dunkin og bíleggingarseðil á Rannsóknarstovuni, G0 - nýggja bygningi á LS